

# Lýst verður eftir **lívfrøðingi** til verkætlanarstarv

**Havstovan leitar eftir starvsfólki til at gera heimildargransking (litteraturstudium) um lív- og vistfrøði og ávirkanir á føroyskum firðum og sundum. Vit leita eftir lívfrøðingi við áhuga fyri føroyskum firðum, og sum hevur hegni at arbeiða sjálvstøðugt við heimildarleiting og at skriva frágreiðing.**

Seinnu árini hevur Havstovan arbeitt nakað inni á føroysku firðunum. Talan hevur verið um at kanna brisling, yngul, gróður og gróðrarlíkindi. Fyri at leggja til rættis, so skynsamt sum gjørligt, víðari kanningar á firðum og sundum, er neyðugt at taka saman um tey úrslit, ið longu eru atkomulig – í Føroyum og aðrastaðni – og eyðmerkja vitanarglopp. Hetta umfatar eisini ávirkan av mannaelvdum árinum, so sum aling á firðunum og útbyggingar og annað virksemi fram við landi.

### Arbeiðsøkið

- Tú skalt leita fram viðkomandi heimildir um:
  - Fiskalívfrøði og lívfrøði annars á føroyskum firðum
  - Búøki hjá fiski fram við landi
  - Møguliga ávirkan av aling á fisk og fiskasamfeløg
  - Møgulig árin av øðrum mannaelvdum virksemi fram við landi
- Tú skalt skriva frágreiðing um funnu niðurstøðurnar
- Tú arbeiðir sjálvstøðugt, men fært vegleiðing og ráðgeving frá granskarum, sum eru knýttir at verkætlanini

Starvsbyrjan er sum skjótast, og væntandi varir verkætlanin einar átta mánaðir.

### Setanartreytir

Lívfrøðiútbúgving á minst masterstigi ella líknandi útbúgving.

Løn sambært sáttmála millum Akademikarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

### Umsókn

Umsókn við avritum at prógvum, CV og viðkomandi skjølum skal vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi 28. apríl 2025 kl. 10. Umsókn skal sendast í telduposti til Havstovuna frámerkt ”Starv” á **starv@hav.fo**.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til: Eydnu í Homrum, deildarleiðara, teldupost **eydnap@hav.fo**, ella Maritu Rasmussen, stjóra, teldupost **marita@hav.fo**, tlf. 35 39 00.

Verkætlanin er samstarv millum Havstovuna og Firum, og granskarar á báðum stovnunum eru knýttir at verkætlanini. Havstovan og Firum hava farnu árini samstarvað um fleiri verkætlanir á firðum og sundum.

Á Havstovuni verður arbeitt við at granska, kenna og ráðgeva um havumhvørvið í teimum økjum, har Føroyar hevur fiskiveiðuáhugamál.

Granskingararbeiðið á Firum hevur til endamáls at menna vitan um aling og viðurskifti, ið kunnu setast í samband við aling og teir karmar, alingin virkar undir.

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

Nóatún 1
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo